## Venjararnir til arbeiðis

Umframt ítróttarliga partin so eru eisini fyrifallandi uppgávur av ymsum slag, sum føroysku landsliðsvenjararnir mugu loysa á Cypros-ferðini. Eitt nú vórðu Jakob Jónsson og Dia Midjord settir í sving, meðan spælararnir vóru til setanina á Challenge Trophy-kappingini. Íroknað setanina, so máttu føroysku kvinnurnar nevnliga vera í høllini í einar seks tímar mikudagin, og so skuldi matur sjálvandi í motorin. Og sum tað sæst á myndini, so fóru Jakob og Dia hugagóðir til verka, tá hetta skuldi gerast.



## Bretar í donskum skúla

Sammett við enska liðið, sum Føroyar smurdu av fyri tveimum árum síðani, er framgongdin ikki bara stór. Hon er risastór. Nú Stórabretland skal verða vertur fyri olympisku leikunum um fýra ár, hava bretarnir nevnliga gjørt nógv fyri at styrkja um ítróttagreinina, sum nærum ikki fanst í landinum áður. Soleiðis fekk enska hondbóltssambandið fyri tveimum árum síðani avtalu um, at 15 kvinnur og 15 menn sluppu á ítróttacollege í Aarhus, har tey ganga á hondbóltslinjuni. Seks av hesum næmingum eru í dag á enska landsliðnum, og hartil verður eisini roynd at styrkja liðið við naturaliseraðum spælarum, og tí er talan í dag langt ífrá um sama walk-over, sum tað var fyri tveimum árum síðani hjá føroyska liðnum.

# Samanhald fram um skilna

**Tað var boðskapurin, sum fyrireikararnir høvdu at bera áhoyrarunum, tá Challenge Trophy-kappingin varð sett. Ein boðskapur, sum cypriotar helst kenna betur enn tey flestu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Føroyska liðið er her komið upp á pláss eftir innmarchin við setanina*

**Larnaca, Cypros:** Í áratíggju hevur Cypros nevnliga verið býtt í ein turkiskan og ein grikskan part. Ein skilnaður, sum ST-trygdarlið í nógv ár eisini hava hildið eygað við, tí veruligur vandi fyri borgarakríggi ella eina turkiskari herseting støðugt hevur verið til staðar. Og tann gerandisdagurin hevur við árunum gjørt, at Cypros í dag er sett saman av tveimum púrasta ymiskum veruleikum.

### Haldið saman

Júst royndirnar av hesum vóru tær, sum fyrireikararnir løgdu størsta dentin á, tá Challenge Trophy-kappingin varð sett her við Larnaca.

- Latið hesa kappingina verða ein stevna, har vinarlag og samanhald eru í hásætinum. Vit vita av egnum royndum, hvussu strævin gerandisdagurin kann verða, um vit ikki halda saman. Og okkara vón er, at vit her á Cypros eisini finna saman sum eitt fólk og sum ein tjóð, var niðurstøðan hjá formanninum í olympisku nevndini hjá Cypros, tá hesin setti kappingina.

Umframt varaforsetan í olympisku nevndini hjá Cypros, vóru eisini røðarar fyri cypriotiska hondbóltssambandið, cypriotiska ítróttasambandið og fyri Larnaca, har kappingin verður hildin.

# Favorittarnir vunnu

**Ongland hevur hug at blanda seg, men saman við Føroyum staðfestu Bosnia og Finnland, at tey skulu roknast millum favorittarnar í kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Larnaca, Cypros:** Saman við Bosnia og Finnlandi verður føroyska liðið mett millum tey sterkastu í Challenge Trophy-kappingini, og úrslitini fyrsta kappingardagin vístu eisini, at tann metingin er ikki langt av leið.

Veikasta landið í kappingini er uttan iva Malta, og hesar fingu av at vita frá Finnlandi í fyrsta dystinum. Og í hinum dystinum í tí bólkinum vann Bosnia greiðan sigur Ísrael.

Bosnia tykist tó ikki heilt so sterkt sum tað liðið, ið vann Challenge Trophy-kappingina á heimavølli fyri tveimum árum síðani. Eitt nú er Sabina Pehic, sum ta ferðina varð kosin sum besti spælarin í kappingini, ikki við á liðnum hesaferð. Pecih er eisini á bosniska fóbóltslandsliðnum, og sum skilst, so raðfestir hon fótbóltin væl hægri enn hondbóltin, ið mest sum er at rokna sum hjáputl hjá henni, skilst úr bosnisku leguni.

Føroyski sigurin á Estlandi staðfestir eisini, at Føroyar skulu roknast millum tey sterku í kappingini. Og so er spurningurin er so helst, um Stórabretland megnar at blanda seg ímillum hesi. Sum nevnt aðrastaðni, so hevur framgongdin verið risastór hjá enska liðnum, og ivaleyst verður kappingin fyri teirra viðkomandi nýtt sum mátistokku fyri, hvussu langt liðið er komið í menninginni móti Olympisku leikunum, sum verða hildnir í 2012.

**Hondbóltur**
**Challenge Trophy**

**Bólkur A**
Úrslit mikudagin
Finnland-Malta 40-7
Bosnia/Herzegovina-Ísrael 33-22

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Finnland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 40 | 7 | 33 | 2 |
| 2 Bosnia/Herzegovina | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 33 | 22 | 11 | 2 |
| 3 Ísrael | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 22 | 33 | -11 | 0 |
| 4 Malta | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 7 | 40 | -33 | 0 |

**Bólkur B**
Úrslit mikudagin
Cypros-Stórabretland 17-29
Føroyar-Estland 32-17

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 32 | 17 | 15 | 2 |
| 2 Stórabretland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 29 | 17 | 12 | 2 |
| 3 Cypros | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 17 | 29 | -12 | 0 |
| 4 Estland | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 17 | 32 | -15 | 0 |